FØROYA
ARBEIÐSGEVARAFELAG

# Ársfrásøgn 2019

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Innihaldsyvirlit

**Frágreiðing frá nevndini** .......... 4

**Árið ið fór** .......... 6
Privati arbeiðsmarknaðurin .......... 6
Samráðingarrundan 2018-2020 .......... 6
Sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya .......... 6
Sáttmálin við YTF um Elektron .......... 6
Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk .......... 6
Sáttmálin við Súluna .......... 6
Samráðingarrundan 2020-2022 .......... 7
Komandi sáttmálasamráðingar .......... 7
Løgtingsvalið 2019 .......... 8
Vinnudagurin 2019 .......... 8
Poul Michelsen Ársins Virki 2019 .......... 8
FÖRKA Ársins Átak 2019 .......... 9
Heimleiðistiltøk .......... 9
Koronafarsóttin .......... 9

**Vinnuliga virksemið** .......... 10
Framgongdin helt fram í 2019 .......... 10
Útflutningur og annar ídnaður .......... 12
Uppsjóvarfiskiskapur og -tilvirking .......... 12
Botnfiskur og botnfiskatilvirking .......... 13
Havbúnaður .......... 14
Olja og annar ídnaður .......... 14
Handils- og tænastuvinnur .......... 15
Handilsvinna .......... 15
Ráðgevaravinna .......... 16
Shippingvinna .......... 16
Byggi- og handverkaravinnur .......... 17
Ferðavinna .......... 17
Aðrar kreppur í søguligum baksýni .......... 18

**Tilmælir frá Føroya Arbeiðsgevarafelag** .......... 21
Vinnupolitikkur .......... 21
Hjálparpakkar .......... 21
Langtíðarætlanir .......... 21
Samskipað almenna virksemið .......... 21
Lægri lønarskatt og kappingarføra skattaskipan .......... 22
Atgongd til útlendska arbeiðsmegi .......... 22
Støðugan politikk og tryggar karmar .......... 22

**Føroya Arbeiðsgevarafelag** .......... 23
Limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag .......... 23
Uppgávur og endamál hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag .......... 23
Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag .......... 24
Vinnuhúsið .......... 26




# Frágreiðing frá nevndini



**Bogi Jacobsen**
Nevndarformaður

Stór framgongd hevur verið í føroyska samfelagsbúskapinum seinastu árini, og 2019 var einki undantak í so máta.

Stórur vøkstur var í lønargjaldingunum. Fólkatalið og løntakaratalið settu met. Sama gjørdi metlága arbeiðsloysið, sum kom heilt niður á 0,8% í seinnu helvt av 2019.

Útflutningurin av vørum nærum tvífaldaðist frá 2012 til 2019, og hesi árini hevur útflutningsvirðið verið væl hægri enn innflutningsvirðið.

Hetta hevur skapt stórur inntøkur uttanífrá til føroyska samfelagsbúskapin seinastu árini. Árliga avlopið á føroyska handilsjavnanum, við vørum, hevur ligið um næstan hálva aðru milliard seinastu árini, tó 2018 undantikið.

Føroyski búskapurin reið sostatt á aldurygginum í einum búskaparligum hákonjunkturi inn í 2020.

Stóra avbjóðingin var at fáa arbeiðsmegi til alt virksemið í landinum, men hesar fortreytir broyttust brádliga, tá ið koronasmittan spjaddi seg til okkara leiðir.

Um miðjan mars vórðu strong tiltøk sett í verk, fyri at forða koronasmittuni at spjaða seg enn meira. Stórur partur av virkseminum í føroyska samfelagnum varð læstur niður yvir nátt. Ein so brádlig vend í búskaparliga virkseminum er neyvan sædd áður.

Koronatiltøkini hava havt stórar avleiðingar við sær fyri virksemið í landinum. Hvussu stórar avleiðingarnar fara at verða fyri føroysku vinnuna, er ilt at meta um í løtuni, tí enn valdar stór óvissa um útlitini.

Ferðavinnan og vinnur knýttar at ferðavinnuni, merktu alt fyri eitt sviðan av koronatiltøkunum, tá

ið tær vórðu læstar niður yvir nátt. Aðrir vinnugeirar vórðu eisini meint raktir av koronatiltøkunum frá fyrsta degi, t.d. flutningsvinnan og aðrar tænastu- og handilsvinnur.

Framleiðsluvinnurnar merktu rættiliga skjótt avleiðingarnar av koronatiltøkunum úti í heimi, tí eftirspurningurin eftir fiski og fiskavørum minkaði nógv, tá ið koronatiltøkini løgdu alt matstovuvirksemið stilt niðri í Evropa og á øðrum útflutningsmarknaðum.

Hvussu avleiðingarnar fara at verða fyri hesar vinnugeirar, sum frá líður, er nógv tengt at útlitunum og gongdini í altjóða búskapinum, og hvussu politiska skipanin ætlar at menna og útbyggja føroyska samfelagið komandi árini.

Altjóða gjaldoyragrunnurin, IMF, metti í apríl í ár, at vit skulu heilt út í 2022, áðrenn londini, sum vit útflyta mest til, eru komin á sama búskaparliga støði aftur, sum tey vóru á í 2019. Metingin er treytað av, at gongdin í smittuspjaðingini ikki versnar, so neyðugt verður at herða tiltøkini aftur.

Føroya Arbeiðsgevarafelag brúkar nógva orku til samráðingar og ymsar spurningar um sáttmálaviðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum. Soleiðis var eisini í undanfarna ári.

Samráðingarrundan 2018–2020 byrjaði við samráðingunum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm arbeiðarafeløgini. Úrslitið av hesum samráðingum var ein karmur á 3,26 % fyrra árið og 2,56 % seinna árið.

Karmarnir hildu í allari samráðingarrunduni.

Nýggja samráðingarrundan fyri sáttmálaskeiðið 2020-2022, byrjaði í aðru viku í mai.

Fyrstu samráðingarnar vóru um sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, sum gingu út 1. mai í ár. Samráðingarnar endaðu Grundlógardagin 5.juni 2020, tá nýggjur tvey ára sáttmáli varð undirskrivaður.

Sáttmálin merkir ein samlaðan karm á 2,98% alt sáttmálaskeiðið. Hækkingin er 1,73% fyrra árið og 1,25% seinna árið.

Hetta verður støðið undir øllum hinum samráðingunum, ið eru á skránni í hesi samráðingarrunduni.

Løgtingsval var í 2019, og feløgini í Vinnuhúsinum høvdu brúkt nógva orku til at fyrireika seg til valið. Beint eftir at valið varð útskrivað, á Ólavsøku 2019, var Vinnuhúsið tí klárt við nýggjari heimasíðu og nýggjari Facebooksíðu, har feløgini í Vinnuhúsinum løgdu fram síni sjónarmið og valynski til politisku umboðini, sum bjóðaðu seg fram at stjórna landinum eftir valið.

Í løtuni er føroyska samfelagið og allur heimurin í einari óvanliga óvissari støðu, har allar forsøgnir og øll framtíðarútlit skulu takast við stórum fyrivarni.

Roynt verður at stuðla harðast raktu vinnugeirarnar ígjøgnum koronakreppuna við ymsum hjálparpakkum, men tað kemur eisini ein dagur eftir korona, og tá hevur tað týdning at halda seg innanfyri vinnupolitisku karmarnar, samstundis sum roynt verður at fáa samfelagið upp aftur í ferð

Vinnupolitikkurin eigur at taka støði í nútíðini og framtíðar avbjóðingunum hjá vinnu og samfelag. Vinnupolitikkurin eigur at verða vegvísari, har politikarar taka atlit at dagførda vinnupolitikkinum í politisku stýringini av samfelagnum, soleiðis at vinnan veit, hvørjar karmar hon hevur at virka innanfyri fleiri ár fram í tíðina.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til, at harðast raktu vinnugeirarnir verða stuðlaðir ígjøgnum koronakreppuna við tíðaravmarkaðum og munagóðum hjálparpakkum.

Um hugt verður longur fram í tíðina, so mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til lægri lønarskatt, samskipan av øllum almennum virksemi í langtíðarætlanir, smidligari atgongd til útlendska arbeiðsmegi og ein støðugan vinnupolitikk við tryggum kørmum.

Tórshavn, tann 8. juni 2020.

**Bogi Jacobsen**
Nevndarformaður

# Árið ið fór

**Føroya Arbeiðsgevarafelag brúkar nógva orku til samráðingar og ymsar spurningar um sáttmálaviðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum. Soleiðis var eisini í undanfarna ári. Harumframt fór nógv orka til at gera sjónarmiðini hjá vinnuni sjónlig í almenna rúminum í sambandi við løgtingsvalið. Hesar seinastu mánaðirnar hava koronatiltøkini og koronakreppan fylt stóran part av dagsskránni hjá feløgunum í Vinnuhúsinum**

## Privati arbeiðsmarknaðurin

Føroya Arbeiðsgevarafelag, við undirfeløgum tess, varðar av øllum sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum á landi umframt sáttmálunum fyri handilsskip. Størsta sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag. Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjari nýggjari samráðingarrundu, og leggja hesar støðið undir øllum sáttmálunum í runduni.

## Samráðingarrundan 2018-2020

Samráðingarrundan 2018–2020 byrjaði við samráðingunum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm arbeiðarafeløgini.

Úrslitið var ein karmur á 3,26 % fyrra árið og 2,56 % seinna árið, sum helt í allari samráðingarrunduni.

Tað kann viðmerkjast, at nakað av avbjóðingum vóru í hesi samráðingarrunduni, tá bæði flogskiparar og flogternur meldaðu seg inn í danska fakfelagið FPU.

Flogskiparafelag Føroya og Føroya Arbeiðsgevarafelag undirskrivaðu tó ein nýggjan sáttmála í mars 2019. Flogternurnar endurstovnaðu Súluna, og nýggjur sáttmáli var undirskrivaður við Súluna í desember 2019.

Sí meira um samráðingarnar niðanfyri.

## Sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Flogskiparafelag Føroya skrivaðu undir nýggjan 4-ára sáttmála, tann 30. mars 2019.

Sáttmálin er galdandi frá 1. apríl 2019 til 31. mars 2023.

Lønin hækkar 3,26% frá 1. apríl 2019 og 2,56% frá 1. apríl 2020. Í 2021 og 2022 hækkar lønin við sama lutfalli sum hækkingarnar í høvuðssáttmálanum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag gera, ávikavist 1. mai 2020 og 1. mai 2021.

## Sáttmálin við YTF um Elektron

Mánadagin 27. mai 2019 gjørdu Føroya Arbeiðsgevarafelag og YTF (Yrkisfelag teirra, sum starvast í tryggingar-, fíggjar-, KT o.l. fyritøkum) semju um nýggjan sáttmála, galdandi fyri Elektron.

Sáttmálin er galdandi í tvey ár, fram til 31. mai 2021.

Lønin hækkar 3,26% fyrsta árið og 2,56% seinna árið umframt aðrar smávegis broytingar í sáttmálanum.

## Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk

Týsdagin 15. november 2019 skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroysk Miðlafólk undir nýggjan tvey ára sáttmála, fyri miðlafólk á privatu miðlunum.

Semjan hevur somu lønarhækkingar, sum hinar semjurnar, ið Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt í samráðingarrundini 2018-2020.

## Sáttmálin við Súluna

Samráðingarnar við Súluna byrjaðu 2. september 2019. Samráðingarnar gjørdust drúgvar, og vóru merktar av, at flogternur høvdu meldað seg inn í danska fakfelagið FPU. 11. november kom Semings-



stovnurin upp í samráðingarnar, og 9. desember 2019 varð nýggjur sáttmáli undirskrivaður millum partarnar saman við viðtøkusáttmála millum Atlantic Airways og FPU, galdandi fyri flogternur búsitandi í Danmark og starvsettar á basum hjá Atlantic Airways í Danmark.

Semjan hevur somu lønarhækkingar, sum hinar semjurnar, ið Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt í samráðingarrundini 2018-2020.

## Samráðingarrundan 2020-2022

Nýggja samráðingarrundan fyri sáttmálaskeiðið 2020-2022, byrjaði í aðru viku í mai. Fyrstu samráðingarnar vóru um sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, sum gingu út 1. mai í ár, og úrslitið av hesum samráðingunum leggur, sum vanligt, støðið undir øllum hinum samráðingunum, ið eru á skránni í hesi samráðingarrunduni.

Vanliga verður farið undir samráðingarnar í mars mánaði, men í ár var avgjørt at  byrja seinni vegna COVID-19 átøkini.

Samráðingarnar millum partarnar endaðu í seming, og fríggjadagin 5. juni góðtóku partarnir eitt semingsuppskot um nýggjan tvey ára sáttmála. Avtalaðu lønarhækkingarnar eru hesar:

1 . august 2020 hækkar lønin 1,25%
1 . august 2020 hækkar eftirlønin 1%
1 . mai 2021 hækkar lønin 1,25%

Hækkingin í løn og eftirløn kemur ikki í gildi 1. mai sum vanligt, men er útsett til 1. august. Seinkaða lønarhækkingin í 2020, og tað, at ein partur av hækkingini er eftirløn, ið ikki hevur sama kostnað fyri arbeiðsgevaran sum ein lønarhækking, merkir, at samlaði karmurin hetta sáttmálaskeiðið er 2,98%.

## Komandi sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir í hesi samráðingarrunduni ganga út sum víst niðanfyri.

| | |
|---|---|
| **1. jun 2020** | Sáttmálin við Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar á landi |
| **1. okt 2020** | Sáttmálin við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna |
| **1. okt 2020** | Sáttmálin við Atlantic Workers Union |
| **1. jan 2021** | Sáttmálar við Starvsmannafelagið fyri starvsfólk á Føroya Tele |
| **1. mar 2021** | Sáttmálarnir við Skipara- og Navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið og Fiskimannafelagið um manningar í handilsflotanum |
| **1. mai 2021** | Sáttmálin við S & K |
| **1. mai 2021** | Sáttmálin við Grafiska Yrkisfelagið |
| **1. mai 2021** | Sáttmálarnir við YTF og Finansforbundet |
| **1. jun 2021** | Sáttmálin við YTF um Elektron |
| **1. nov 2021** | Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk |
| **1. nov 2021** | Sáttmálin við Súluna |



## Løgtingsvalið 2019

Beint eftir at løgtingsvalið varð útskrivað, á Ólavsøku 2019, var Vinnuhúsið klárt við bæði nýggjari heimasíðu og Facebooksíðu, har arbeiðsgevara- og vinnugreinafeløgini í Vinnuhúsinum løgdu fram síni sjónarmið og valynski til politisku umboðini, sum bjóðaðu seg fram at stjórna landinum eftir valið.

Filmsbrotini og valynskini á heimasíðuni vóru soljóðandi:

- Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir betri atgongd til arbeiðsmegi
- Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir lægri og kappingarførar lønarskattir
- Føroya Arbeiðsgevarafelagið ynskir langtíðarætlanir
- Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir ein dagførdan vinnupolitikk
- Føroya Handverksmeistarafelag ynskir løggilding av handverksmeistarum
- Ferðavinnufelagið ynskir eina landsfevnandi loysn um gongd í haga
- Ferðavinnufelagið ynskir at tryggja matstovuvinnuni ræði á egnum innkeypi
- Handilsvinnufelagið ynskir eina samskipaða føroyska pantskipan
- Havbúnaðarfelagið ynskir yrkisútbúgving innan havbúnað
- Havbúnaðarfelagið ynskir kappingarførar karmar
- KT-felagið ynskir fleiri íløgur í føroyskar KT-loysnir
- Oljuvinnufelagið ynskir Føroyar raðfestar sum ein maritiman tænastudepil
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip ynskir betri marknaðaratgongd
- Reiðarafelagið ynskir kappingina um arbeiðsmegi javnsetta
- Ráðgevarafelagið ynskir einar sjálvbjargnar Føroyar við ráðgevaratænastum
- Samskifti ynskir føroyskt mál góðkent á Google

Innsløgini við sjónarmiðunum frá vinnuni eydnaðust sum heild væl og løgdu upp til nógvar viðmerkingar og kjak í almenna rúminum.

Eisini skipaði Vinnuhúsið fyri pallborðsfundi við umboðum fyri politisku flokkarnar, stutt fyri løgtingsvalið.

## Vinnudagurin 2019

Hetta var 20. ferð, at skipað varð fyri Vinnudegnum. Tað er framvegis týdningarmikið at halda fast við henda eina dagin um árið, har føroysk vinna kann vera saman um hetta, sum onkur hevur kallað hátíðardagur vinnurnar. Luttøkan var góð og dagurin væleydnaður.

Á Vinnudegnum vórðu kósin Ársins Virki og Ársins Átak 2019.

## Poul Michelsen Ársins Virki 2019




Dómsnevndin grundgav m.a. soleiðis fyri at velja P/F Poul Michelsen til Ársins Virki 2019.

Nevndin leggur dent á støðugu menningina av heilsøluvirkseminum, samansett við eini áhaldandi leitan eftir nýggjum handilsmøguleikum og marknaðum.

Samstundis sum felagið hevur vaksið um virksemið, hevur tað megnað at styrkt um vinningin.

Nevndin ger vart við týdningin av P/F Poul Michelsen í víðkanini av veiting og úrvali av bæði frystum og fírskum matvørum ígjøgnum árini, og menningina av teirra reingerðarfelagið til landsins størsta.

P/F Poul Michelsen er ein týdningarmikil arbeiðsgevari, sum leggur dent á sosiala ábyrgd við at skipa fyri skeiðum í føroyskum máli og føroyskari mentan til tey starvsfólkini, ið nýliga eru flutt til Føroyar.

Nevndin er sum heild hugtikin av úrslitunum, ið starvsfólk og leiðsla í felagnum hava megnað, og hvussu felagið er ment yvir árini.

Hetta er orsøkin til at P/F Poul Michelsen er ársins virki 2019.

## FÖRKA Ársins Átak 2019




Dómsnevndin grundgav m.a. soleiðis fyri at velja P/F FÖRKA til Ársins Átak 2019.

Vinnuátakið er ein virðisløn, ið verður handað einum átaki, ið leggur stóran dent á at vera umhvørvisliga, sosialt og/ella búskaparliga burðardygt.

Dómsnevndin viðurkennir málið hjá P/F FÖRKA at framleiða burðardygga orku burturúr lívrunnum tilfari, har meginparturin annars hevði verið beint burtur sum burturkast. Harafturat kann tilfarið, sum gassini longu er komin úr, brúkast sum hágóðsku natúrlig tøð, og harvið økja um burðardygdina og effektivitetin hjá bóndagørðunum, ið fáa tøðini.

Dómsnevndin leggur dent á, at vit noyðast at fremja broytingar, tá ið útlitini eru, at 9,7 milliardir fólk vera á jørðini í 2050. Vit noyðast í størri mun at nýta og endurnýta tilfeingið fyri at minka um tað, ið verður beint burtur sum burturkast.

Tað nýggja biogass verkið er hitt fyrsta av sínum slag í Føroyum, og mett verur, at tað er ført fyri at veita streym til 10% og hita til 2% av føroysku húsarhaldunum. Hetta merkir eisini, at P/F FÖRKA er ført fyri at minka um $CO_2$ útlátið við heili 11.000 tonsum.

FÖRKA merkir at flyta ella broyta, og hetta er júst tað tørvur er á. Fleiri og fleiri fólk skilja tørvin á at fara yvir til eitt samfelag við lágum útláti, og fyri at hetta skal bera til, noyðast vit at broyta bæði okkara hugsanarhátt og hættirnar vit gera tingini uppá.

## Heimleiðistiltøk

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur havt hesi fýra heimleiðistiltøkini á skránni, hetta seinasta árið.

- Heimleiðistiltak um hvílitíðir og trygdarskipanina í Arbeiðsumhvørvislógini
- Heimleiðistiltak um handils- og uttanríkisviðurskifti
- Heimleiðistiltak um nýggju GDPR dátuverndarlóggávuna
- Heimleiðisfundur við Trade Council úr Danmark

## Koronafarsóttin

Árið byrjaði við góðum útlitum fyri framhaldandi vøkstri og framgongd í føroysku vinnuni, samstundis sum ein koronafarsótt hótti við at spjaða seg úr Kina til restina av heiminum.

Eingin hevði tá væntað, at tiltøkini at forða korona-smittuni í at spjaða seg í restini av heiminum, fóru at fáa so ógvusliga ávirkan og avleiðingar fyri búskaparligu fortreytirnar í heimsbúskapinum, tá bert tríggir mánaðir vóru farnir av hesum árinum.

Tiltøkini at forða koronasmittuni at spjaða seg hava eisini havt ógvusligar avleiðingar fyri vinnuligu fortreytirnar og útlitini í Føroyum. Føroyska ferða-vinnan er serstakliga hart rakt av av almennu koronatilmælunum, sum tvingaði ferðavinnuna at steðga øllum sínum virksemi yvir nátt. Útlitini fyri útflutningsmarknaðunum og virkseminum á heima-marknaðinum annars, eru somuleiðis merkt av stórari óvissu í løtuni.

Tiltøkini at forða koronasmittuni at spjaða seg, umframt viðmerkingar og tilmæli til ymsu hjálpar-átøkini hjá politisku skipanini, hava fylt nógv í dagligu ráðgevingini í Vinnuhúsinum, síðan koronatiltøkini vórðu sett í verk um miðjan mars í ár.



# Vinnuliga virksemið

**Stór framgongd hevur verið í føroyska búskapinum seinastu árini, og 2019 var einki undantak í so máta. Stórur vøkstur var í lønargjaldingunum. Fólkatalið og løntakaratalið settu met. Sama gjørdi metlága arbeiðsloysið, sum kom heilt niður á 0,8% í seinnu helvt av 2019. Soleiðis byrjaði árið í ár, men øll búskaparlig útlit broyttust skeiva vegin, tá ið koronakreppan brádliga rakti allan heimin í mars í ár. Í løtuni er tí stór óvissa um búskaparligu útlitini.**

## Framgongdin helt fram í 2019

Stór framgongd hevur verið í føroyska samfelagsbúskapinum seinastu árini, og 2019 var einki undantak í so máta.

Í 2019 var vøksturin í samlaðu lønargjaldingunum 6,8%. Tað er væl hægri enn árligi miðalvøksturin í lønargjaldingunum á 5,1% frá 2012 til 2019, sí mynd 1.

**Mynd 1: Lønargjaldingar, 2012–2019**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Stórur vøkstur hevur eisini verið í fólkatalinum og løntakaratalinum, sum bæði settu met í 2019. Sama gjørdi metlága arbeiðsloysið, sum kom heilt niður á 0,8% á heysti 2019. Miðalarbeiðsloysisprosentið fyri alt árið 2019, var 1,1%, sí talvu 1.

Útflutningurin av vørum er næstan tvífaldaður frá 2012 til 2019, sí talvu 2. Útflutningurin var næstan 4 mia. kr. hægri í 2019 enn í 2012. Sama tíðarskeið vaks innflutningurin góðar 1,4 mia. kr. Útflutningsvirðið hevur verið væl hægri enn innflutningsvirðið, og hetta hevur skapt stórur inntøkur uttanífrá til føroyska samfelagsbúskapin seinastu árini. Árliga avlopið á føroyska handilsjavnanum, við vørum, hevur ligið um næstan hálva aðru milliard seinastu árini, tó undantikið 2018, tá ið tað var eitt stórt fall í útflutningsvirðinum, sí talvu 2.

**Talva 1: Fólkatal, løntakarar og arbeiðsloysi, 2012-2019**

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal | 48.062 | 48.179 | 48.638 | 49.142 | 49.823 | 50.481 | 51.300 | 52.154 |
| Løntakarar[1] | 22.839 | 22.535 | 23.149 | 23.967 | 24.519 | 25.473 | 26.259 | 26.940 |
| Arbeiðsloysi í % | 5,6 | 4,5 | 3,8 | 2,9 | 2,9 | 2,4 | 1,8 | 1,1 |

*1) Hagstova Føroya hevur nýliga broytt uppgerðarháttin av løntakaratalinum. Hetta merkir umleið 1.000 færri løntakarar árliga, samanborið við uppgerðir, gjørdar eftir gamla uppgerðarháttinum. Gongdin í løntakaratalinum er tó ikki ávirkað av broytingini.    Kelda: Hagstova Føroya.*

**Talva 2: Føroyski handilsjavnin við vørum, 2012-2019**

| Mió. kr. | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útflutningur tilsamans** | **5.553** | **6.181** | **6.461** | **6.942** | **8.090** | **8.777** | **8.023** | **9.539** |
| Laksur | 1.823 | 2.456 | 2.951 | 2.805 | 3.662 | 3.868 | 3.342 | 4.042 |
| Uppsjóvarfiskur | 1.408 | 1.571 | 1.522 | 1.754 | 1.878 | 2.388 | 1.848 | 2.391 |
| - Svartkjaftur | 173 | 152 | 123 | 161 | 176 | 145 | 156 | 161 |
| - Sild | 329 | 410 | 291 | 484 | 402 | 622 | 486 | 739 |
| - Makrelur | 827 | 814 | 884 | 854 | 990 | 1.039 | 682 | 964 |
| - Fiskamjøl og fóður | 79 | 195 | 224 | 255 | 310 | 582 | 524 | 527 |
| Toskur hýsa og upsi | 935 | 916 | 956 | 1.178 | 1.110 | 1.152 | 1.308 | 1.621 |
| Síl rækjur o.a. | 870 | 857 | 751 | 974 | 1.024 | 967 | 988 | 882 |
| Aðrar vørur | 211 | 277 | 269 | 180 | 194 | 312 | 447 | 509 |
| Skip og flogfør | 306 | 104 | 12 | 51 | 222 | 90 | 90 | 94 |
| **Innflutningur tilsamans** | **6.683** | **6.273** | **6.021** | **6.125** | **6.598** | **7.261** | **7.746** | **8.146** |
| Til hav- og landbúnað | 366 | 381 | 346 | 410 | 428 | 446 | 485 | 550 |
| Rávøra til fiskavirking | 156 | 168 | 123 | 183 | 217 | 310 | 244 | 263 |
| Tilfar til byggivinnuni | 357 | 427 | 502 | 523 | 617 | 691 | 817 | 834 |
| Tilfar til aðra framleiðslu | 1.349 | 1.319 | 1.398 | 1.406 | 1.460 | 1.580 | 1.616 | 1.917 |
| Maskinur og amboð | 447 | 410 | 651 | 603 | 861 | 832 | 1.014 | 800 |
| Brennievni | 1.303 | 1.249 | 1.159 | 803 | 647 | 950 | 1.283 | 1.134 |
| Akfør | 213 | 279 | 307 | 382 | 412 | 498 | 494 | 567 |
| Til beinleiðis nýtslu | 1.164 | 1.215 | 1.287 | 1.339 | 1.437 | 1.555 | 1.580 | 1.657 |
| Skip og flogfør | 1.328 | 825 | 248 | 476 | 519 | 399 | 213 | 424 |
| **Handilsjavni** | **-1.130** | **-92** | **440** | **817** | **1.492** | **1.516** | **277** | **1.393** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Soleiðis byrjaði árið 2020. Føroyska samfelagið reið inn í árið á aldurygginum í einum búskaparligum hákonjunkturi. Stóra avbjóðingin var at fáa arbeiðsmegi til alt virksemið í landinum, men hesar fortreytir broyttust brádliga, tá ið koronasmittan spjaddi seg til okkara leiðir.

Um miðjan mars vórðu strong tiltøk sett í verk, fyri at forða koronasmittuni at spjaða seg enn meira. Stórur partur av virkseminum í føroyska samfelagnum varð læst niður yvir nátt. Ein so brádlig vend í búskaparliga virkseminum er neyvan sædd áður.

Koronatiltøkini hava havt stórar avleiðingar við sær fyri virksemið í landinum. Hvussu stórar avleiðingarnar fara at verða fyri føroysku vinnuna, er ilt at meta um í løtuni, tí enn valdar stór óvissa um útlitini.

Ferðavinnan og vinnur knýttar at ferðavinnuni, merktu alt fyri eitt sviðan av koronatiltøkunum, tá ið tær vórðu læstar niður yvir nátt. Aðrir vinnugeirar vórðu eisini meint raktir av koronatiltøkunum frá fyrsta degi, t.d. flutningsvinnan og aðrar tænastu- og handilsvinnur.

Framleiðsluvinnurnar merktu rættiliga skjótt avleiðingarnar av koronatiltøkunum úti í heimi, tí eftirspurningurin eftir fiski og fiskavørum minkaði nógv, tá ið koronatiltøkini løgdu alt matstovuvirksemið stilt niðri í Evropa og á øðrum útflutningsmarknaðum.

Hvussu avleiðingarnar fara at verða fyri hesar vinnugeirar, sum frá líður, er nógv tengt at útlitunum og gongdini í altjóða búskapinum, og hvussu politiska skipanin ætlar at menna og útbyggja føroyska samfelagið komandi árini.

Stutt eftir at koranakreppan hevði rakt allan heimin í apríl í ár, gjørdi altjóða gjaldoyragrunnurin, IMF, eina forsøgn um búskaparligu útlitini í 2020 og 2021. Sambært hesi forsøgnini, verða størstu útflutningsmarknaðirnir hjá Føroyum hart raktir av koronatiltøkunum. IMF metir, at BTÚ minkar 5,6% í 2020 og veksur síðan 4,7% aftur í 2021. Forsøgnin fevnir um 15 av teimum størstu útflutningsmarknaðunum hjá Føroyum.

Vit skulu sostatt heilt fram til 2022, áðrenn BTÚ aftur er á sama støði sum í 2019. Forsøgnin er treytað av, at smittuspjaðingin ikki versnar, soleiðis at tað verður neyðugt at herða tiltøkini aftur,

Niðanfyri er gongdin, støðan og útlitini í ymsum vinnugeirum í føroyska samfelagnum lýst nærri.

## Útflutningur og annar ídnaður

Nógv tann størsti parturin av føroyska vøruútflutninginum er fiskur og fiskavørur, sí mynd 2. Fiskur og fiskavørur liggja um 94% av føroyska vøruútflutninginum.

**Mynd 2: Føroyski vøruútflutningurin, 2010–2019**




Samlaði útflutningurin av fiskavørum minkaði umleið 900 mió. kr. frá 2017 til 2018, úr 8,4 mia. kr. niður í 7,5 mia. kr., men í 2019 er virðið á fiskavøruútflutninginum vaksið aftur við næstan 1,5 mia. kr. upp í 8,9 mia. kr.

Laksur og uppsjóvarfiskur standa fyri umleið 70% av útflutningsvirðinum av fiskavørum, og tað var serliga eitt fall í útflutningsvirðinum av laksi, makreli og sild, sum dró samlaða útflutningsvirðið skeiva vegin í 2018.

## Uppsjóvarfiskiskapur og -tilvirking

So at siga allur tann uppsjóvarfiskur, sum føroysk skip fiska, verður landaður til føroysku uppsjóvar-virkini. Harumframt verður eitt sindur landað frá útlendskum skipum.

Rávørutilgongdin til føroysku uppsjóvarvirkini er tí í stóran mun tengd at kvotunum av uppsjóvarfiski, sum eru tillutað føroyskum skipum. Samlaðu nøgdirnar av avreiddum uppsjóvarfiski minkaðu í 2018 og í 2019, men samlaða avreiðingarvirðið var nakað hægri hesi bæði árini, samanborið við 2017.

Bæði útflutningsnøgd og -virðið minkaði í 2018, men í 2019 vóru bæði nøgdir og virðið á útflutninginum av uppsjóvarfiski á leið tey somu aftur, sum í 2017, sí mynd 3.

Gongdin hjá føroysku uppsjóvarvirkjunum varð nógv merkt av ógvusliga eldsbrunanum, har virkið hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri brann í grund á sumri 2017. Virksemið hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri lág tí stilt heilt fram til heystið 2018. Hetta merkti tó meira virksemið hjá hinum uppsjóvarvirkjunum í landinum.

**Mynd 3: Útflutningsvirðið á uppsjóvarfiski, 2010–2019**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Tiltøkini at forða koronasmittuni at spjaða seg, hava havt stóra ávirkan á uppsjóvarvinnuna. Tað er tó ymiskt, hvussu virkini eru fyri. Onkur hevur nógvan fisk á goymslu, meðan onkur annar hevur minni á goymslu.



Goymslurnar hjá heilsølukundunum á útflutningsmarknaðunum eru eisini stórar, og summir keyparar hava munandi størri goymslur enn teir ynskja sær.

Russland er ein stórur marknaður fyri uppsjóvarfisk, og har byrjaðu koronatiltøkini ikki at merkjast fyrr enn nakað seinni enn í Evropa.

Marknaðurin er sera trekur, og merktur av óvissu. Fólk skulu tó eta, og makrelur er ein lutfalsliga bílig matvøra, so vónandi kemur gongd aftur í eftirspurningin innan alt ov langa tíð. Hvussu prísurin verður, er tó ilt at meta um.

Meira fæst at vita um føroyska uppsjóvarvinnuna á heimasíðuni hjá Felagnum Nótaskip, www.notaskip.fo

## Botnfiskur og botnfiskatilvirking

Samlaða feskfiskaveiðan hjá føroyskum skipum hevur víst framgongd seinastu árini, men vit eru framvegis langt frá góðu árunum kring aldarskiftið. Hóast fiskiskapurin eftir toski, hýsu og upsa hevur verið undir helvtina av tí hann var í góðu árunum kring aldarskiftið, so er fiskiskapurin og rávørutilgongdin til føroysku fiskavirkini, av hesum trimum botnfiskasløgunum, væl batnaður seinastu árni.

Hetta sæst aftur í útflutningsvirðinum av botnfiski, sum er nógv hækkað seinastu árini, sí mynd 4.

Tað var framvegis stórur vøkstur í útflutningsvirðinum av botnfiski, áðrenn heimsumfatandi tiltøkini at forða koronasmittuni at spjaða seg, vórðu sett í verk um miðjan mars í ár. Eftirspurningurin minkaði skjótt, men framleiðslan av upsa og øðrum botnfiski helt tó fram. Goymslurnar vuksu tí skjótt.

**Mynd 4: Útflutningsvirðið á botnfiski, 2010–2019**

Mió kr.




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Fyri saltfiskaframleiðarar raktu koronatiltøkini ringasta tíðspunktið av árinum, stutt fyri páskir, tí páskirnar eru háárstíð fyri saltfisk í suðurevropa. Onkur saltfiskaframleiðari steðgaði framleiðsluni, men er spakuliga byrjaður aftur.

Marknaðurin fyri hvítan fisk er trekur og óvissur í løtuni. Hetta ávirkar sjálvsagt prísin. Nógva framleiðslan á goymslu, bindur gjaldføri. Manglandi gjaldføri kann gerast ein forðing, um verandi støða stendur við. Nøkur skip hava ligið orsakað av truplu marknaðarstøðuni, og tað ávirkar eisini framleiðsluna.

Virkini hava tó sum heild havt fólk til arbeiðis, eisini fyri ikki at missa tey til aðrar vinnur. Um koronakreppan verður drúgv, so er spurningurin, hvussu leingi hetta fer at bera til. Tað er ein váði at framleiða á goymslu, tí eingin veit, hvussu prísurin verður, tá ið fiskurin á goymslu skal seljast aftur.

## Havbúnaður

Føroyskur havbúnaður stendur fyri slakari helvt av samlaða føroyska fiskavøruútflutninginum, og laksur er greitt tann størsta einstaka útflutningsvøran úr Føroyum, sí mynd 5. Meginparturin av útflutninginum er heilur feskur laksur og laksaportiónir.

Í 2019 fór 96 % av laksaútflutninginum til teir 4 høvuðsmarknaðirnar ES (35%), USA (23%), Russland (21%) og Kina (18%). Laksaútflutningurin til kinesiska marknaðin er eftir fáum árum øktur úr næstan ongum upp í 18%, men Føroyar hava í løtuni onga handilsavtalu við Kina, og kann hetta seta føroyska útflutningin av laksi til Kina í vanda, um Noreg og Kina koma á mál við sínamillum handilssamráðingunum. Hóast útflutningurin til Russlands minkaði í 2019, er framvegis talan um ein týðandi laksamarknað.

**Mynd 5: Útflutningsvirðið á laksi, 2010–2019**

Mió kr.




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Saman við skynsamari lívfrøðiligari stýring hevur tann høgi laksaprísurin havt við sær, at feløgini hava havt góð fíggjarlig úrslit í 2019. Fyritøkurnar hava nýtt týðandi part av úrslitinum til at gera íløgur í útbygging av smoltstøðunum, nýggj tænastuskip og tól til ikki-medisinska lúsafyribyrging og -viðgerð. Slíkar íløgur eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan, og gera tað møguligt at økja um framleiðsluna á ein burðardyggan hátt, við tað, at smoltini eru størri, áðrenn tey koma í ringarnar. Føroyska alivinnan hevur síðan 2004 framleitt laks uttan at nýta antibiotika.

Vinnan hevur framvegis ymsar avbjóðingar. At berjast ímóti fiskalús og sjúkum, so sum sjúkuelvandi ILA og táknusjúku, hevur høga raðfesting. Nýggjar avbjóðingar, sum standast av skiftandi aliumstøðum, fara eisini at koma enn meira í miðdepilin komandi árini.

Tiltøkini at forða koronasmittuni at spjaða seg, hava havt stóra ávirkan á føroysku alivinnuna. Eftirspurningurin frá matstovum og gistingarhúsum er minkaður í stórum, tó at eftirspurningurin eftir virkaðum vørum til húsarhaldini samstundis er øktur. Flutningur til fjarskotnu marknaðirnar hevur verið avbjóðandi, og sum heild hevur stór óvissa valdað á marknaðinum.

Heimsframleiðslan av laksi vaks við uml. 7% í 2019 samanborið við 2018. Hóast henda vøkstur, helt miðal heimsmarknaðarprísurin á laksi sær rímiliga væl, tó at hann var eitt vet lægri enn árið fyri.

Greiningarfyritøkan Kontali metir, at heimsframleiðslan av laksi í 2020 væntandi økist uml. 2-4% í mun til í fjør. Orsakað av koronatiltøkunum er í løtuni torført at siga nakað um prísgongdina fyri 2020. Prísurin lækkaði fyrst nógv, men hevur so í seinastuni rættað seg nakað aftur.

Meira fæst at vita um føroyska havbúnaðinum í ársfrásøgnini 2019 hjá Havbúnaðarfelagnum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

## Olja og annar ídnaður

Í november 2019 fór freistin í 5. útbjóðingarumfari at søkja um loyvi at bora eftir olju á føroyska landgrunninum, men einki felag søkti um loyvi. Tað ber tó framvegis til at søkja landsstýrið um loyvi at bora eftir olju á føroyska landgrunninum umvegis



"Open Door" skipanina. Í løtuni eru tó eingi útlit fyri, at tað verður nakað oljuvirksemi á føroyska landgrunninum í nærmastu framtíð.

Hóast einki oljuvirksemið hevur verið á føroyska landgrunninum hesi seinastu árini, so hevur alla tíðina verið áhugi og nakað av virksemi við royndarboringum og tí, ið hartil hoyrir, nærhendis føroyska markið.

Áhugin fyri royndarboringum og oljuvirksemið nærhendis okkum er vaksandi, og virksemið kemur alsamt tættari føroyska markinum.

Føroysk frálandavinna hevur stóran áhuga í leitingarvirkseminum nærhendis føroyska markinum, tí ferðasambandið millum Føroyar og meginlandið í Evropa er nógv betri, enn ferðasambandið, sum Norður Skotland og Hetland kunnu bjóða fyritøkunum í olju- og frálandavinnuni.

Árið í ár hevur verið eitt serstakliga vánaligt ár fyri altjóða oljuvinnu. Stórt fall var í altjóða oljuprísunum í byrjanini av árinum. Síðan kom koronakreppan og tók botnin undan øllum oljumarknaðinum. Altjóða oljuprísurin hevur verið søguliga lágur, eftir at koronatiltøkini brádliga tóku ferðina av virkseminum í heimsbúskapinum, men tað er neyvan nakar ivi um, at oljuprísurin fer at fara upp aftur, tá ið virksemið í altjóða búskapinum spakuliga fer at koma fyri seg aftur.

Føroysk frálandavinna vónar tí ikki, at koronakreppan verður ov drúgv, vinnan metir seg vera kappingarføra at veita tænastur til oljuvinnuna, nærhendis føroyska markið, hóast útlit ikki eru fyri nøkrum oljuvirksemið á føroyska landgrunninum í nærmastu framtíð.



Føroyskur ídnaður er annars eyðkendur við einari ella fáum fyritøkum av sama slagi, t.d. matvørurframleiðarum, bryggjaríum, prentsmiðjum og framleiðarum av reingerðarevnum. Felags fyri framleiðsluna hjá føroyskum ídnaðarfyritøkum er, at tær virka í harðari kapping við stórar útlendskar framleiðarar.

Føroyskir brúkarar eru sum heild jaligir at stuðla føroyskar framleiðslu. Serliga nú, undir koronakreppuni, hevur føroysk vinna merkt stuðulin frá føroysku brúkarunum. Føroysk vinna saknar tó neyðug átøk frá politisku myndugleikunum at tryggja javnbjóðis kapping millum føroyska og útlendska vinnu.

## Handils- og tænastuvinnur

Stóri vøksturin í inntøkunum í føroyska samfelagsbúskpinum hevur havt við sær stóran vøkstur í eftirspurniginum og virkseminum á føroyska heimamarknaðinum seinastu árini. Avbjóðingarnar hava verið at útvega arbeiðsmegi til at nøkta stóra eftirspurningin, men koronatiltøkini skapa nú stóra óvissu um framtíðarútlitini fyri føroyska heimamarknaðin.

## Handilsvinna

Eftirspurningurin og umsetningurin í heimligu handilsvinnuni er nógv vaksin hesi seinastu árini, men nógva virksemið hevur eisini havt avbjóðingar við sær, tí partar av handilsvinnuni hava havt stórar avbjóðingar við at útvega arbeiðsmegi, og bráðtørvurin á arbeiðsmegi var ein tann størsta avmarkingin fyri framhaldandi vøkstri, áðrenn koronatiltøkini settu ferðina í handilsvinnuni munandi niður í seinnu helvt av mars í ár.

Tað er ymiskt, hvussu koronatiltøkini hava rakt handilsvinnuna. Handlar, ið selja mat- og vanligar gerandisvørur, hava koyrt sum vanligt, og onkur hevur havt væl meira at gera. Harafturímóti minkaði sølan av klædnavørum, bilum og sølu til vinnuna, t.d. catering og onnur heilsøla til ferðavinnuna, nógv.

Fleiri føroyskir nethandlar hava sæð dagsins ljós í kjalarvørrinum av koronatiltøkunum, men føroysku nethandlarnir líða undir ójavnari kapping frá útlendsku nethandlunum á føroyska marknaðinum, tí útlendskir nethandlar fáa fíggjarligan stuðul umvegis føroysku MVG-lógina at virka á føroyska marknaðinum.

Meira fæst at vita um føroysku handilsvinnuna í ársfrásøgnini 2019 hjá Handilsvinnufelagnum, undir vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

## Ráðgevaravinna

Nógva virksemið og stóri eftirspurninginum í føroyska samfelagnum sum heild, hevur havt týðilig ringárin við sær í føroysku tænastuvinnunum. Serliga ráðgevarafyritøkurnar í byggivinnuni hava havt úr at gera. Fleiri ráðgevarafyritøkur eru lagstar afturat og talið av starvsfólkum í føroysku ráðgevaravinnuni hevur verið vaksandi.

Føroyska ráðgevaravinnan hevur drúgvar royndir og breiða vitan um øll sløg av arbeiðum, sum tørvur er á at fáa gjørt í Føroyum, og ráðgevaravinnan hevur strembað eftir, at hetta eisini fer at vera so í framtíðini, tí fyrimunirnir eru nógvir.

Í fyrsta lagi verða vitanarstørv varðveitt í landinum, og í øðrum lagi er ráðgevingin smidligari, tá hon verður veitt í nærumhvørvinum. Í triðja lagi eru føroysku tímatakstirnir lægri enn í grannalondunum. Harafturat kemur, at føroyska samfelagið hevur stórt gagn av, at vitanin um at byggja bygningar og aðra nýgerð eftir føroyskum fortreytum verður varðveitt og ment her á landi.

Tá ið koronatiltøkini vórðu sett í verk um miðjan mars, merkti ráðgevaravinnan týðiliga, at fóturin varð settur á bremsuna. Verkætlanir, sum vóru í gongd, fóru nógv niður í ferð. Samskiftið við byggiharrarnar broyttist nógv. Tað byrjaði at taka langa tíð at fáa afturmeldingar og svar frá byggiharrunum.

Í koronkreppuni hevur lítil framdrift verið í verkætlanum, sum eru í planleggingarfasuni. Verkætlanir verða útsettar, bæði almennar og privatar verkætlanir.

Løgtingið plagar at samtykkja íløgukarmarnar fyri landið komandi fimm árini, áðrenn 1. apríl í verandi ári, men henda mannagongdin varð fyri fyrstu ferð slept í ár, orsakað av vandanum fyri koronasmittu. Hetta er ógvuliga harmiligt, tí tørvurin á langtíðarætlanum er sera stórur í løtuni, nú koronasmittan brádliga hevur gjørt framtíðarútlitini so óviss.

Ráðgevaravinnan vónar tí, at fyrireikingarnar av langtíðarætlanum hjá landi, kommunum og privata geiranum koma aftur á borðið sum skjótast.

Meira fæst at vita um føroysku ráðgevaravinnuna í ársfrásøgnini 2019 hjá Ráðgevarafelagnum, undir vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Føroyska KT-vinnan hevur somuleiðis verið í stórum vøkstri seinastu árini. Føroyar stevna inn í eina talgilda framtíð, har tøknin verður ein alt meira sjónligur partur av gerandisdegnum. Eftirspurningurin eftir KT-tænastum er tí nógv øktur, og fer at økjast enn meira frameftir.

Fortreytin fyri at føroyska samfelagið skal fáa ágóðan av talgildingini, er, at uppgávurnar verða bodnar út millum føroyskar fyritøkur, soleiðis at førleikarnir at viðlíkahalda talgilda infrakervið eisini eru í Føroyum í framtíðini.

Meira fæst at vita um føroysku KT-vinnuna, undir vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Føroyska samskiftisvinnan hevur seinastu árini merkt støðugt og vaksandi virksemi og framgongd, bæði her heima og uttanlands, har føroyskar samskiftisfyritøkur eisini koma inn á marknaðirnar. Tað er heldur ikki óvanligt, at føroyskar samskiftisfyritøkur vinna heiðurslønir uttanlands.

Meira fæst at vita um føroysku samskiftisvinnuna, undir vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

## Shippingvinna

Føroyska shippingvinnan er vorðin ein alt meira týðandi partur av føroysku vinnuni, bæði her heima, men eisini við nógvum virksemið uttanfyri landoddarnar. Talan er tí fyri stóran part um eina altjóða vinnu, har eftirspurningurin er tætt knýttur at altjóða konjunkturunum. Knapt 1.800 fólk eru knýtt at føroysku shippingvinnuni, bæði á sjógvi og á landi.

Tiltøkini at basa kornasmittuni hava havt stóra ávirkan á føroysku shippingvinnuna. Bæði inn- og útflutningur er minkaður, men serliga útflutningurin av fiski og fiskavørum er hart raktur. Harumframt er flutningur víðari út í heim dýrkaður munandi seinastu tíðina. Útlitini eru óviss, men heldur gongdin fram ov leingi, so fer tað at hava stóra ávirkan á flutningsfeløgini.

Eisini tann parturin av føroysku shippingvinnuni, sum hevur virksemið í olju- og frálandavinnuni er nógv ávirkaður av koronatiltøkunum. Verkætlanir verða avlýstar í hópatali, og nýggjar verkætlanir verða útsettar ella avlýstar. Tað er tí vandi fyri, at føroysk skip kunnu verða løgd í styttri ella longri tíð.

Meira fæst at vita um føroysku shippingvinnuna í ársfrásøgnini 2019 hjá Reiðarafelagnum fyri Handilsskip, undir vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

## Byggi- og handverkaravinnur

Tað hevur verið stórt trýst á føroysku byggivinnuni seinastu árini, og tað sæst aftur í lønargjaldingunum og løntakaratalinum í byggivinnuni. Lønargjaldingarnar eru meira enn tvífaldaðar frá 2013 til 2019, sí mynd 6.

**Mynd 6: Lønargjaldingar í byggivinnuni, 2010–2019**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Í 2019 vóru næstan 900 fleiri løntakarar í føroysku byggivinnuni enn í 2012, sí mynd 7, og tørvurin á arbeiðsmegi í byggivinnuni var framvegis metstórur, tá ið vit komu inn í hetta árið.

**Mynd 7: Løntakarar í byggivinnuni, 2010–2019**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Byggivinnan væntaði longu tíðliga í hesum árinum, at tørvurin á arbeiðsmegi fór at minka í nærmastu framtíð, tí fleiri størri byggiverkætlanir fara at verða lidnar um somu tíð í hesum árinum. Føroyska byggivinnan væntaði tó, at tað framvegis fór at vera nógv virksemi í byggivinnuni komandi tíðina, tí nógvir ordrar stóðu á bíðilista.

Tað er framvegis nógv virksemið í byggivinnuni, men koronatiltøkini hava nú skapt stóra óvissu um framtíðarútlitini. Verandi verkætlanir hava stórt sæð koyrt sum vanligt. Effektiviteturin hevur tó verið darvaður nakað av ymsum tiltøkum á byggiplássunum fyri at verja ímóti smittuspjaðing, eins og verkætlanir ganga nakað seinri, tí ymsar málsviðgerðir hjá myndugleikunum fóru at taka nógv longri tíð, eftir at koronatiltøkini vórðu sett í verk.

At Løgtingið legði langtíðarætlanir sínar til síðis, samstundis sum fleiri privatar verkætlanir fyribils eru útsettar, tí støðan er so óviss í løtuni, skapar serliga stóra ørkymlan í byggivinnuni. Tað skal tó viðmerkjast, at nakrar kommunur hava roynt at bøtt um støðuna, við at seta gongd á ymiskar verkætlanir.

Fleiri fyritøkur í byggi- og handverkaravinnunum stúra tí fyri, at ordrabøkurnar verða tómar, tá ið vit koma longur út í árið.

## Ferðavinna

Hóast føroyska ferðavinnan framvegis er ein lutfalsliga lítil partur av samlaða føroyska búskapinum, so hevur vøksturin í føroysku ferðavinnuni verið sannførandi hesi seinastu árini.

Hagstova Føroya hevur gjørt árligar kanningar av, hvussu nógvan pening vitjandi ferðafólk leggja eftir seg í føroyska samfelagsbúskapinum, og kanningarnar vísa, at tað hevur verið stórur vøkstur í inntøkunum frá útlendskum ferðafólkum í heimliga føroyska samfelagsbúskapinum seinastu árini. Bruttovirðisøkingin frá ferðafólkum er farin úr 165 mió. kr. í 2011, upp í 421 mió. kr. í 2019, og nærkaðist nú einari hálvari milliard, áðrenn koronakreppan broytti allar fortreytirnar í ferðavinnuni, sí mynd 8.

**Mynd 8: Bruttovirðisøking frá útlendskum ferðafólkum, 2011–2020**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Inntøkurnar, sum útlendsk ferðafólk leggja eftir seg í Føroyum, eru útflutningsinntøkur, sum skulu leggjast afturat føroyska útflutningsvirðinum. Ferðavinna hevur nógv avleitt virksemi við sær, og er tí rættiliga umfatandi.

Í 2019 rindaðu føroysku gistingarhúsini og matstovurnar næstan 166 mió. kr. í lønum, sí mynd 9.

**Mynd 9: Lønargjaldingar frá gistingarhúsum og matstovum, 2011–2019**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Tað starvaðust næstan 800 løntakarar í føroysku gistingarhúsunum og matstovunum í 2019, sí mynd 10.

**Mynd 10: Løntakarar í gistingarhúsum og matstovum, 2011–2019**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Útlitini og fortreytirnar fyri framhaldandi vøkstri í føroysku ferðavinnuni vóru serstakliga jalig og góð, áðrenn koronatiltøkini brádliga raktu føroysku ferðavinnuna. Føroysk ferðavinna metir varisliga, at koronatiltøkini fara at merkja eina afturgongd í føroysku ferðavinnuni, svarandi til umleið 70% í ár.

Hetta verður sjálvandi ein dyggur smeitur fyri føroyska búskapin, sum helst fer at minka væl omanfyri 300 mió. kr. í ár, tí útlendsk ferðafólk ikki fara at koma til Føroyar í 2020.

Tað verður tó ein nógv størri smeitur fyri føroyska búskapin, um føroysk ferðavinna ikki fær nøkur útlit fyri at byrja aftur, har hon slepti, men skal byrja aftur á sama støði, sum hon var á fyri 10 árum síðan.

Stóri vøksturin seinastu árini og góðu útlitini fyri framhaldandi vøkstri, hevur skapt stórt bjartskygni í føroysku ferðavinnuni, og tí hevur ferða-, matstovu- og gistingarhúsvinnan gjørt stórar íløgur seinastu tíðina. Fleiri av hesum íløguverkætlanunum eru framvegis í gerð og hava tí einki kastað av sær, nú koronatiltøkini hava læst alla føroysku ferðavinnuna niður.

Føroyska ferðavinnan er tí ógvuliga viðbrekin og hevur lítið mótstøðuføri mótvegis einum slíkum óvanliga hørðum skelki, sum koronakreppan hevur givið ferðavinnuni.

Meira fæst at vita um føroysku ferðavinnuna, undir vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

## Aðrar kreppur í søguligum baksýni

Enn er allur heimurin í einari korona undantaksstøðu, og tí valdar stór óvissa um avleiðingarnar av koronakreppuni fyri virksemið í heimsbúskapinum komandi árini. Flestu eygleiðarar eru tó samdir um, at koronatiltøkini hava rakt altjóða búskapin sera meint, og at avleiðingarnar av tiltøkunum fara at merkjast fleiri ár fram í tíðina.

Avleiðingarnar verða tí dúgliga samanbornar við aðrar søguligar kreppur, sum hava rakt heimsbúskapin.

Búskaparligar kreppur eru ikki ókendar í Føroyum, og fleiri búskaparligar kreppur hava rakt føroyska búskapin gjøgnum tíðina, bæði kreppur uttanífrá og kreppur, sum hava havt sín uppruna í føroyska samfelagnum.

Nakrar av kreppunum, sum hava rakt føroyska búskapin undanfarnu hundrað árini, bæði uttanífrá og við uppruna í føroyska samfelagnum, eru hesar:

- Waal Street kreppan í 1929 (Altjóða)
- 2. heimsbardagi (Altjóða)
- Kreppan í 1950-unum (Føroysk)
- Oljukreppan í 1973 (Altjóða)
- Kreppan fyrst í 1990-unum (Føroysk)
- Kreppan í alivinnuni í 2004 (Føroysk)
- Altjóða fíggjarkreppan í 2008 (Altjóða)
- Koronakreppan í 2020 (Altjóða)

Húsagangirnir á virðisbrævamarknaðinum á Waal Street í New York í oktober 1929, hevði við sær álvarsliga kreppu í altjóða búskapinum, og hetta rakti eisini

føroyska búskapin. Tíðirnar vóru tí ringar í Føroyum í 1930-árunum og fram til 2. heimsbardaga, tá ið Føroyar vórðu hersettar av Onglandi.

Undir ensku hersetingini undir 2. heimsbardaga, vann føroyska samfelagið fitt av inntøkum við m.a. at flyta fisk úr Íslandi til Onglands.

Búskaparliga vóru Føroyar tí rímiliga væl fyri eftir krígslok í 1945 við stórum fíggjarligum ognum í enskum fíggjarstovnum, men miseydnaðar íløgur í føroyska fiskiflotan og ein álvarslig gjaldoyrakreppa, har virðið á pundinum rapaði, førdu føroyska búskapin inn aftur í eina djúpa kreppu í 1950-árunum.

Beint fyri kreppuna, í 1948, fingu Føroyar heimastýrislógina, og í kreppuni í 1950-árunum, sá politiska skipanin tað sum sína fremstu uppgávu at fáa virksemið aftur í føroyska fiskiflotan.

Løgtingið gjørdi í 1953 greitt, at tað var sinnað at brúka alla orku til at útvega samfelagnum skip, og Løgtingið hevði ta fatan, at íløgur í skip ikki kundu bera seg, uttan stuðul úr landskassanum. Skipanir vórðu tí gjørdar, sum tryggjaðu teimum, ið ætlaðu at byggja skip, munagóðan almennan stuðul.

Almenni stuðulin og politiska uppíblandingin í vinnuna var tó ikki avmarkaður til íløgustuðul at byggja skip. Stórar upphæddir vórðu eisini veittar í vanligum rakstrarstuðli til fiskivinnuna, og landskassin setti partapening í næstan øll flakavirkir kring landið.

Hesin politikkurin við almennum íløgustuðli, rakstrarstuðli, partapeningi og veðhaldum fyri privatu vinnuna gjørdist alt meira umfatandi og helt fram, líka til búskaparligu kreppuna, sum føroyska samfelagið kom í fyrst í 1990-árunum. Fiskivinnan bar seg ikki, hóast stuðulsupphæddirnar úr landskassanum vóru ovurhonds stórar.

Føroyski samfelagsbúskapurin kom tí út í eina djúpa og álvarsliga kreppu fyrst í 1990-árunum við stórum arbeiðsloysið, bankarnir fóru á húsagang og fólk fluttu av landinum, undan kreppuni, í metstórum tali.

Í fyrru helvt av 1990-árunum minkaði føroyska fólkatalið við góðum 10% eftir nøkrum fáum árum, og á sumri 1994 var føroyska arbeiðsloysið umleið 25%.

Búskaparkreppan í fyrru helvt av 1990-árunum er tí ringasta kreppa, sum hevur rakt føroyska búskapin í nýggjari tíð, sí mynd 11-14. Kreppan var fyri stóran part úrslit av einum miseydnaðum føroyskum vinnupolitikki.

Búskaparkreppan tvingaði ein nýggjan vinnupolitikk á skrá í Føroyum fyrst í 1990-árunum, har greiðari linjur vórðu strikaðar upp millum almenna og privata uppgávu- og ábyrgdarbýtið.

Tað komu eisini fleiri aðrar nýskipanir av føroyska samfelagnum eftir 1990, sum hava havt ávirkan á vinnuliga bygnaðin og politisku atferðina mótvegis vinnuni, t.d. ALS-skipanin, MVG-skipanin og yvirtøkurnar av umsitingini av tungu vælferðarøkjunum.

Búskaparkreppan í fyrru helvt av 1990-árunum var tí ein dýrur, men týðandi lærdómur fyri føroyska samfelagið.

Kreppur hava rakt føroyska búskapin síðan tá, t.d. kreppan í alivinnuni í 2004 og altjóða fíggjarkreppan í 2009. Hesar kreppur hava tó ikki havt so ógvusligar avleiðingar við sær fyri føroyska samfelagsbúskapin, sum kreppan fyrst í 1990-árunum hevði. Tað kemst fyri stóran part av nýggja vinnupolitikkinum, sum varð orðaður eftir kreppuna fyrst í 1990-árunum.

Stórt fall var í virkseminum í føroyska alivinnuni frá 2000 til 2003, tá ið sjúka og fallandi prísir á alifiski á heimsmarknaðinum brádliga raktu alivinnuni. Løntakaratalið minkaði við nærum einum fjórðingi og lønargjaldingarnar minkaðu út við 40% í alivinnuni hesi árini. Útflutningsvirðið av alifiski minkaði eina góða helvt frá 2003 til 2006 . Kreppan í alivinnuni sást aftur í føroyska búskapinum, men hon førdi tó ikki til álvarsliga búskaparkreppu.

Altjóða fíggjarkreppan í 2008 sást eisini aftur í føroyska búskapinum, men her vóru eisini onnur viðurskifti í føroysku fiskivinnuni, sum gjørdu seg galdandi. Hetta var eitt serstakliga vánaligt ár fyri botnfiskaveiðuna undir Føroyum. Lágir fiskaprísir og høgir oljuprísir tyngdu harumframt nógv um raksturin hjá botnfiskaflotanum í 2008 og 2009. Í 2010 fóru bæði Eik Banki og Fiskavirking á húsagang.

Hesar hendingar skelkaðu føroyska búskapin, men ikki so ógvusliga, sum kreppan í fyrru helvt av 1990-árunum. Heldur ikki avleiðingarnar av oljukreppuni, sum rakti allan heimin í 1973, kunnu samanberast við kreppuna í 1990-árunum.

Hetta vóru nakrar av týdningarmestu kreppunum, sum hava rakt føroyska búskapin undanfarnu 100 árini.

Hvørjar avleiðingar koronakreppan fer at hava á føroyska búskapin, sum frá líður, er trupult at meta um í løtuni. Tað veldst nógv um, hvussu drúgv koronakreppan verður, og um koronasmittan kemur fyri seg aftur í fleiri umførum.

**Mynd 11: Føroyska fólkatalið 1970–2020**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

**Mynd 13: Lønargjaldingar tilsamans, 1985–2019**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

**Mynd 12: Føroyskir løntakarar tilsamans, 1985–2019**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

**Mynd 14: Arbeiðsloysisprosent, 1994–2020**




*Kelda: Hagstova Føroya.*



# Tilmælir frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Í løtuni er føroyska samfelagið og allur heimurin í einari óvanliga óvissari støðu, har allar forsøgnir og øll framtíðarútlit skulu takast við stórum fyrivarni. Roynt verður at stuðla harðast raktu vinnugeirarnar ígjøgnum koronakreppuna við ymsum hjálparpakkum, men tað kemur ein dagur eftir korona, og tí hevur tað týdning, at halda seg innanfyri vinnupolitisku karmarnar, tá ið samfelagið skal fáast upp aftur í ferð.**

## Vinnupolitikkur

Vinnupolitikkurin, sum varð orðaður eftir kreppuna í fyrru helvt av 1990-árunum, eigur stóran part av æruni fyri framburðinum og vælferðini í føroyska samfelagnum í dag. Vinnupolitikkurin varð seinast dagførdur og tillagaður samfelagnum í 2005, og Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur seinastu árini fleiri ferðir mælt til, at vinnupolitikkurin verður endurskoðaður og tillagaður dagsins samfelag, men hetta er ikki gjørt enn.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur fast við tilmælini um at endurskoðað og dagføra vinnupolitikkin. Grundarlagið undir vinnupolitikkinum, sum varð orðaður eftir kreppuna í 1990-árunum, har tað m.a. varð ásettur greiður skilnaður millum privat og alment virksemi, eigur framvegis at vera tað sama.

Hesin skilnaður má ikki kámast burtur, nú vit eru á veg inn í eina niðurgongd í heimsbúskapinum eftir koronakreppuna.

Vinnupolitikkurin eigur at taka støði í nútíðini og framtíðar avbjóðingunum hjá vinnu og samfelag. Vinnupolitikkurin eigur at verða vegvísari, har politikarar taka atlit at dagførda vinnupolitikkinum í politisku stýringini av samfelagnum, soleiðis at vinnan veit, hvørjar karmar hon hevur at virka innanfyri fleiri ár fram í tíðina.

## Hjálparpakkar

Tiltøkini at forða koronasmittuni at spjaða seg, raktu føroysku vinnuni sum snarljós frá klárum himni.

Alt inntøkugrundarlagið varð brádliga skrykt undan pørtum av føroysku vinnuni, meðan aðrir partar koma at merkja avleiðingarnar sum frá líður.

Eingin hevði sæð hetta koma, og tí raktu koronatiltøkini serstakliga hart, serliga fyritøkur, sum vóru mitt í einum menningar tíðarskeiði, við nógvari framgongd og stórum íløgum, ið einki hava kastað av sær enn. Hesar fyritøkur høvdu tí lítið mótstøðuføri, tá koronakreppan, púra óvart, rakti tær.

Serlig ferða- og matstovuvinnurnar eru hart raktar, og tað verður ein vanlukka fyri føroysku vinnuna og føroyska samfelagsbúskapin, um øll menningin og alt tað, sum er bygt upp í hesum vinnum, seinastu árini, fer fyri skeytið av koronakreppuni, og vinnurnar verða fluttar fleiri ár aftur í tíðin, og skulu byrja av nýggjum harfrá.

Tað hevur tí stóran týdning fyri hesar vinnur og allan tann føroyska samfelagsbúskapin, at myndugleikarnar stiðja hart raktu fyritøkurnar ígjøgnum skelkin, sum tær hava fingið av koronatiltøkunum, soleiðis at tær kunnu byrja aftur, har tær vóru, tá ið almennu myndugleikarnir læsti tær niður við koronatilmælunum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at harðast raktu vinnugeirarnir verða stuðlaðir ígjøgnum koronakreppuna við tíðaravmarkaðum hjálparpakkum.
Tað hevur stóran týdning, at hjálparpakkarnir eru tíðaravmarkaðir og munagóðir.

## Langtíðarætlanir

Tíðin við tíðaravmarkaðum hjálparpakkum gongur yvir, og tí hevur tað stóran týdning at hyggja longur fram í tíðina, soleiðis at vit eisini hava ætlanir fyri, hvussu samfelagshjólini fáast upp aftur í ferð, tá ið møguligu langtíðar avleiðingarnar av koronakreppuna fara at merkjast.

## Samskipað almenna virksemið

Vanliga plagar Løgtingið at viðgera og samtykkja fíggjarligu karmarnar hjá landinum komandi fimm árini, áðrenn 1. apríl á hvørjum ári, men soleiðis var ikki í ár. Koronatiltøkini hava havt við sær, at Løgtingið

manglar at viðgera og samtykkja karmarnar hjá landinum fyri komandi fimm árini.

Politiska skipanin hevur tí eitt gylt høvi at samskipa alt alment virksemið í langtíðarætlanir, serliga á íløgusíðuni, sum taka atlit til møguligar langtíðar avleiðingar av koronakreppuni.

Hetta hevði samstundis verið eitt stig rætta vegin, at regulera viðrekandi fíggjarpolitikkin, sum hevur verið eitt søguligt eyðkenni fyri føroyska búskapin, bæði tá ið tað gongur við og tá ið tað gongur ímóti.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til, at raðfestingar hjá landi, kommunum og øllum øðrum almennum virksemi yvirhøvur, verður samskipað í langtíðarætlanir, serliga á íløgusíðuni, har yvirskipaða málið er at fáa langtíðarhaldføri í føroyska búskapin, soleiðis at vit fáa eina javna og støðuga útbygging og menning av føroyska samfelagnum, ið ikki verður so ógvisliga órógvað og nervað av stutttíðar stoytum og sveiggjum í búskapinum.

## Lægri lønarskatt og kappingarføra skattaskipan

Fyri at fáa fólk og vinnu at arbeiða og gera íløgur í Føroyum, er neyðugt at gera føroysku skattaskipanina meira kappingarføra við at lækka vanliga lønarskattin og strika frádráttir og serskipanir, sum eggjar føroyskari arbeiðsmegi at leita aðrastaðni at arbeiða.

Føroyskir arbeiðsgevarar skulu ikki bert kappast við útlendskar arbeiðsgevarar um at gjalda eina kappingarføra løn, teir skulu eisini kappast við lægri lønarskatt í grannalondunum.

Ikki nokk við tað, so fær føroysk arbeiðsmegi harumframt fíggjarligan stuðul úr landskassanum at fara uttanlands at arbeiða fyri útlendskar arbeiðsgevarar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag dugir ikki at finna nakra grundgeving fyri, at útlendskir arbeiðsgevarar fáa óbeinleiðis fíggjarligan stuðul úr landskassanum at seta føroyska arbeiðsmegi.

Føroyska skattaskipanin virkar sostatt kappingaravlagandi mótvegis føroyskum arbeiðsgevarum, og føroyska skattaskipanin eigur at verða grundleggjandi broytt yvir eitt longri áramál, soleiðis at fólk og vinna velja at arbeiða og gera íløgur í Føroyum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til at lækka vanliga lønarskattin og at breiðka skattagrundarlagið við at strika ymsar frádráttir, stuðlar og serskipanir, sum eggjar føroyskari arbeiðsmegi at fara uttanlands at arbeiða.

Hetta kann ikki gerast eftir einum ári. Ein veruligur og munagóður skattalætti hjá vanliga løntakaranum má fremjast yvir eitt longri áramál, har vanligi lønarskatturin stigvíst verður lækkaður, samstundis sum frádráttir og serskipanir verða strikaðar og ymisk borgara- og tænastugjøld koma inn í myndina.

Hetta má gerast í tøttum samstarvi og verða væl samskipa millum land og kommunur, annars kemst ikki á mál við einari slíkari nýskipan av føroysku skattaskipanini.

## Atgongd til útlendska arbeiðsmegi

Undir hákonjunkturinum seinastu árini, hava føroyskar fyritøkur havt ein áhaldandi trupulleika at útvega arbeiðsmegi, tí atgongdin til arbeiðsmegi, hjá føroysku vinnuni, hevur verið ov avmarkað.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at 3,5% arbeiðsloysismarkið í útlendingalógini, fyri at føroyskar fyritøkur kunnu fáa atgongd til útlendska arbeiðsmegi, verður strikað.

Eisini eigur skipanin við forhondsgóðkenning av fyritøkum, at seta í starv útlendska arbeiðsmegi, at verða víðkað, soleiðis at hon verður galdandi yvirhøvur, og ikki einans fyri ES-borgarar.

## Støðugan politikk og tryggar karmar

Í 2017 lat Føroya Arbeiðsgevarafelag kanning gera um føroyska kappingarførið . Kanningin vísti millum annað, at føroyska vinnan sum heild metti óstøðug politisk viðurskifti og tung almenn umsiting, vera millum størstu forðingarnar fyri vinnuligari framgongd í landinum.

Í kanningini varð mett, at hesar forðingar í størri mun vóru galdandi fyri fiski- og alivinnurnar, men at óvissu karmarnir í fiski- og alivinnunum eisini høvdu neiliga ávirkan á hugburðin í øðrum vinnugreinum.

Knappligar lógarbroytingar og manglandi politiskar langtíðarsemjur skapa óvissu um framtíðar politisku kósina og forðar fyri vinnuligari menning.

Politiska óvissan virkar tálmandi á íløguhugin og íløguvirksemið. Óviss framtíðarútlit økja um váðan, og forða tí í stóran mun fyri menning og nýhugsan, bæði í fiskivinnuni og aðrastaðni.

Føroysk vinna hevur sostatt tørv á einum støðugum politiskum umhvørvi við breiðum politiskum langtíðarsemjum um vinnuligu karmarnar.




# Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum. Fremsta uppgávan hjá felagnum er at umboða føroyskar arbeiðsgevarar mótvegis føroysku løntakarafeløgunum í lønar- og sáttmálasamráðingum, og at ráðgeva limum sínum í dagligum spurningum um ymisk sáttmálaviðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag er eisini andlitið úteftir hjá føroyskum arbeiðsgevarum í almenna rúminum.**

## Limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroyskir arbeiðsgevarar og fyritøkur kunnu vera beinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, ella umvegis arbeiðsgevarasamskipanir í teirra vinnugrein, sum eru limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Arbeiðsgevarasamskipanirnar í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru:

- Føroya Handverksmeistarafelag
- Føroya Prentsmiðjufelag
- Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Undir arbeiðsgevarasamskipanunum eru eisini lokal feløg, sum tí eisini eru óbeinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, umvegis arbeiðsgevarasamskipanirnar omanfyri.

Fyritøkur og arbeiðsgevarar, sum ikki hoyra undir virkisøkini hjá arbeiðsgevarasamskipanunum omanfyri, eru beinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

## Uppgávur og endamál hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Ein tann største uppgávan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at samráðast og gera sáttmálar fyri føroysku

vinnuna við løntakarafeløgini á privata føroyska arbeiðsmarknaðinum. Endamálið er at tryggja støðug viðurskifti og tálma lønarvøksturin á privata føroyska arbeiðsmarknaðinum til frama fyri føroyska kappingarførið.

Umsitingin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag veitir limunum tænastur og ráðgeving viðvíkjandi spurningum um t.d. starvsfólkaviðurskifti og leiðslu, lønarsáttmálar, lógir og reglur á vinnuøkinum o.s.fr. Umsitingin hevur harumframt tætt sambond við vinnuna í øðrum londum, og virkar tí eisini sum sambindingarlið millum føroyska og útlendska vinnu.

Ein onnur týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at umboða føroyska vinnu mótvegis føroysku myndugleikunum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er hoyringspartur hjá føroyskum arbeiðsgevarum viðvíkjandi lógum og reglum, sum politisku myndugleikarnir arbeiða við at seta í verk. Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at ávirka lógarsmíðið soleiðis, at vinnuligu karmarnir tæna og ikki darva vinnuliga virksemið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er harumframt, bæði beinleiðis og umvegis dóttirfeløgini, umboðað í nógvum ymiskum stýrum, nevndum og ráðum, ið seta karmar fyri føroyska vinnu. Her gera feløgini sína ávirkan galdandi, soleiðis at vinnusjónarmið vinna frama. Hetta skal tryggja limunum í Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað frameftir verður liviligt hjá fólki við fyritaksemi og hugskotum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag virkar eisini sum andlitið úteftir hjá limum sínum við at kunna og leggja fram sjónarmiðini hjá arbeiðsgevarasíðuni í almenna rúminum.

Felagið skipar javnan fyri størri og smærri tiltøkum fyri limir sínar, t.d. árliga vinnudagin og ymisk kunningartiltøk um broytingar í lóggávu, sáttmálum og tílíkum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag setir eisini eftir tørvi arbeiðsbólkar at greina mál og stevnur, sum ofta gerast hornasteinar í almenna vinnupolitikkinum hjá felagnum.

Meira kunning um lógir o.a. viðvíkjandi Føroya Arbeiðsgevarafelag er at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

## Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag verður vald á árliga aðalfundinum í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Í lóggávu felagsins er ásett, at nevndin skal veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber. Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag er mannað soleiðis:



### Bogi Jacobsen
*Formaður*

Bogi Jacobsen er stjóri í framleiðslu og útflutningsfyritøkuni Varðin Pelagic. Harumframt er Bogi Jacobsen nevndarlimur í P/F Varðin og P/F Fossá. Bogi Jacobsen varð valdur í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2014 og til formann í 2017.



### Høgni Hansen
*Næstformaður*

Høgni Hansen er stjóri í heilsøluni Poul Hansen, og nevndarlimur í fleiri øðrum fyritøkum. Høgni Hansen var nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið varð avtikið. Í 2011 varð Høgni Hansen valdur í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og hevur verið næstformaður felagsins síðan tá.



## Kristoffur Laksá

*Nevndarlimur*

Kristoffur Laksá er samráðingarleiðari Føroya Arbeiðsgevarafelags. Kristoffur Laksá er eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum og sat í nógv ár í nevndini í Føroya Prentsmiðjufelag. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



## Jens Meinhard Rasmussen

*Nevndarlimur*

Jens Meinhard Rasmussen er stjóri í Skansi Offshore. Jens Meinhard Rasmussen er formaður í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip og nevndarlimur í International Chamber of Shipping. Jens Meinhard Rasmussen hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Jón Sigurdsson

*Nevndarlimur*

Jón Sigurdsson er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Umframt at hava verið nevndarlimur í Føroya Handverksmeistarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag í mong ár, er hann eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Sigurdsson hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004.



## Odd Eliasen

*Nevndarlimur*

Odd Eliasen er stjóri í Havsbrún. Odd Eliasen er harumframt stjóri í skotsku alifyritøkuni hjá Bakkafrost, Scottish Salmon Company og partur av samtaksleiðsluni í Bakkafrost. Odd Eliasen hevur verið nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Jóhanna á Bergi

*Nevndarlimur*

Jóhanna á Bergi er stjóri í Atlantic Airways. Áðrenn tað, var hon stjóri í flutningsfyritøkuni Faroe Ship. Jóhanna á Bergi varð vald í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2019, men hon sat eisini í nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, árini frá 2008 til 2014.



## Árni Ellefsen

*Nevndarlimur*

Árni Ellefsen er stjóri í BankNordik. Árni Ellefsen er formaður í Arbeiðsgevarafelagnum hjá Fíggjarstovnum í Føroyum umframt at vera nevndarlimur í øðrum fyritøkum. Árni Ellefsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Fróði Magnussen

*Nevndarlimur*

Fróði Magnussen er stjóri á KT-fyritøkuni Formula. Fróði Magnussen hevur verið formaður í KT-felagnum og er framvegis nevndarlimur har, umframt at vera nevndarlimur í øðrum fyritøkum. Fróði Magnussen hevur sitið í nevndini fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.

## Vinnuhúsið

Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreinafeløgunum í Vinnuhúsinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta fatan, at tað hevur týdning at savna føroysku vinnuna, soleiðis at vinnan fær ein sterkari samleika í samfelagnum umvegis felags umboðan.

Føroya Arbeiðsgevarafelag nýtir Vinnuhúsið sum miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti.

Í Vinnuhúsinum verða bond knýtt millum leiðarar í vinnuni, bæði her heima og uttaneftir, tí Vinnuhúsið oftani er karmur um vitjanir uttaneftir.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag.

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum, men bjóðar ymsum vinnugreinafeløgunum at húsast í Vinnuhúsinum.

Í dag húsast 14 feløg undir sama takið í Vinnuhúsinum. Fimm arbeiðsgevarafeløg og nýggju vinnugreinafeløg. Harumframt leiga Føroya Reiðarafelag og Felagið Nótaskip skrivstovur í Vinnuhúsinum.

Tey fimm arbeiðsgevarafeløgini eru:

- Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Føroya Handverksmeistarafelag
- Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum
- Føroya Prentsmiðjufelag
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Sum nevnt aðrastaðni í frágreiðingini, so umboðar Føroya Arbeiðsgevarafelag hini fýra arbeiðsgevarafeløgini omanfyri, tær sokallaðu arbeiðsgevarasamskipanirnar, í sáttmálasamráðingum við fakfeløgini.

Einstøku arbeiðsgevarafeløgini arbeiða dagliga við at ráðgeva limum sínum við sáttmála- og arbeiðsmarknaðarspurningum, umframt at leggja til rættis arbeiðsmarknaðarmál og yvirskipaðar vinnukarmar.

Tey nýggju vinnugreinafeløgini eru:

- Havnar Handverksmeistarafelag
- Havbúnaðarfelagið
- Føroya Ráfiskakeyparafelag
- Handilsvinnufelagið
- KT-felagið
- Oljuvinnufelagið
- Samskifti
- Ráðgevarafelagið
- Ferðavinnufelagið

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri akkurát teirra vinnugrein. Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

Hesi feløgini leiga skrivstovu í Vinnuhúsinum:

- Føroya Reiðarafelag
- Felagið Nótaskip

Hesi bæði feløgini eru ikki limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag ella partar av Vinnuhúsinum annars.

MEITILBERG